Leiðin gongur aftur til Svangaskarð

Einasti undankappingardysturin hetta landsliðsárið skal leikast á Svangaskarði, men sambært formanninum í Fótsbóltssambandinum hevur hetta einki at gera við, at FSF ikki hevur álit á tórsvallaverkætlanini

Tórsvøllur sleppur bert at leggja gras til annan landsdystin av tveimum hetta árið. HM-undankappingardysturin móti Slovenum, verður leiktur á Svangaskarði

JÁKUP MØRK

Í farnu viku tók Fótbóltssambdni avgerð um, at teir báðir dystirnir, sum føroyska A-landsliðið skal spæla í ár, verða býttir javnt millum teir báðar altjóða leikvøllirnar, Tórsvøll og Svangaskarð.

Sostatt verður dysturin móti dønum leiktur á Tórsvøllí, meðan Slovenar, sum Føroyar hitta í HM-undankappingini, skulu vitja Svangaskarð 3. september.

Eingin ósemja

Tað hevur ljóðað, at orsøkin til avgerðina er, at ov nógv ivamál eru í Tórsvalla verkætlanini til, at FSF torir at leggja altjóða dystirnar her, men hetta verður avsannað úr bæði Tórsvallagrunninum og FSF.

Poul Michelsen sigur við Sosialin, at honum kunnugt eru eingi ógreið viðurskifti í samstarvinum millum Tórsvøll og FSF, men at partarnir tvørtur ímóti júst hava fingið pappír upp á hvønn annan, fyri at øll viðurskifti skulu verða so greið sum gjørligt.

Viðari sigur hann, at hann ongantíð hevur roknað við, at allir altjóða dystir Føroya skulu leikast á Tórsvøllí.

Torleif Sigurðsson, formaður í Fótbóltssambandinum, sigur eins og Poul Michelsen, at eftir hansara tykki er ikki talan um nøkur ógreið viðurskifti. Einasti luturin, sum enn ikki er komin upp á pláss, er hvør skal hava ognarrættin til bygningin, sum í løtuni er undir ger.

Hetta hevur tó ongan praktiskan týdning, men er so at siga bert ein spurningur um fordeiling av inntøkum og útreiðslum greiður fótbóltsformaðurin frá.

Týdningarmikið við tveimum vallum

Torleif leggur afturat, at hansara tykki er tað av stórum týdningi, at Føroyar hava tveir vallir, sum báðir lúka tær altjóða ásetingar, sum er galdandi.

Havadi í huga tað økta virksemið, sum føroyingum hevur verið fyri í altjóða høpi seinastu árini, er heldur einki at ivast í, at tørvur er á minst tveimum vallum.

A-landslið, U-landslið og dystir hjá fótbóltsfeløgum í altjóða høpi gera sítt til, at eftirspurningurin eftir grasinum økist, og tískil er sera týdningarmikið, at slitið á grøna undirlagið verður minkað nakað.

Arbeiði heldur fram

Annars frættist frá grunninum Tórsvøllur, at arbeiði við liðugt gerðini av vøllinum heldur áfram í ár, og sum skilst, eru flestu viðurskiftini fingin í rættlag, tá summarið fer at nærkast.

Poul Michelsen greiður frá, at í vár verður farið undir at gera trappur og WC liðug. Seinastu áskoðaraplássini, sum ætlandi skulu verða framman fyri bygningin, verða ikki sett upp enn, tí hetta vildi órógva arbeiði í sjálvum bygningínum.

Júst nær bygningurin verður liðugt gjørdur vistu hvørki Torleif Sigurðsson ella Poul Michelsen, men FSF formaðurin helt fyri, at tað helst hevur stóran týdning, at farið verður undir hetta arbeiði innan alt ov langa tíð.

Í løtuni er støðan tann, at Tórsvøllur hevur fingið undantaksloyvi, soleiðis at skiftirúmini hjá HB og B36 kunnu nýtast til altjóða dystir, men enn er ikki greitt, hvussu leingi hetta undantaksloyvi stendur við.

Ikki góða byrjan

At enda nevna teir báðir, at teir nú vóna, at friður verður um Tórsvallarmálið. Báðir eru teir samdir um, at vøllurin hevur fingið eina sera baldruta byrjan, har so at siga alt hevur gingið í móti.

Røddir hava verið frammi um, at ov fáir áskoðarar hava verið til dystirnar, men hetta er eisini tengt at, undir hvørjum umstøðum hesir hava verið leiktir.

Regn og vindur hevur verið so at siga hvørja ferð, og tá dystirnir samstundis hava verið sjónvarpaðir út til allar stovur í landinum, er lítið at siga til, at nógv fólk hava aftra seg við at fara til dystirnar.

Harumframt leggur Poul Michelsen afturat, at prísurin á atgongumerkjum varð settur upp, tá dystirnir vórðu lagdir á Tórsvøll, og eftir hansara tykki hevur hetta eisini ávirkað áskoðaratalið skeivan vegin.

Máltindurin
1. deild kvinnur

Ioana Rápa	VÍF	146	(44)
Regina Rádó	VB	116	(33)
Lotte Sørensen	Kyndil	103	(41)
Vesna Tomajek	Stjørnan	102	(45)
Sunrid Gleðisheygg	Tjaldur	82	(21)
Jacklin Durhuus	VÍF	81	(5)
Inga F. Danberg	Neistin	78	(21)
Arnleyð Krosslá	VB	66	
Simona Hansen	Stjørnan	66	(7)
Gurið Mortensen	VB	61	(1)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	60	(2)
Ann Hansen	Kyndil	56	(10)
Annika Ljósstein	Stjørnan	56	(13)
Katrin á Neystabø	Neistin	55	(15)
Ileana Manolescu	Neistin	52	(13)

Ioana Rápa gjørdi enn eitt gott hál leygardagin, og liggur framvegis á odda á máltindinum

1. deild menn

Sámal Joensen	VÍF	145	(29)
Heini Joensen	Neistin	141	(31)
John Petersen	StÍF	129	(39)
Áki Olsen	Neistin	121	(18)
Artur Johansen	StÍF	121	(23)
Jakob Jónsson	Kyndil	99	(7)
Petur Martin Johansen	KÍF	98	(33)
Bjarni Wardum	Kyndil	97	(24)
Ingi Olsen	VÍF	92	(6)
Sverri Justinussen	Tjaldur	86	(13)
Halgir D. Olesen	H71	84	(7)
Suni F. Johannesen	Tjaldur	79	(20)
Vagnur Johannesen	KÍF	75	
Jákup Dam	KÍF	68	(5)
Petur Martin Poulsen	KÍF	66	(6)

Støðan 1. deild kvinnur

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 Stjørnan	4	4	-	0	-	0	402	314	88	17
2 VÍF	5	3	-	0	-	2	380	339	41	13
3 Kyndil	4	2	-	0	-	2	336	295	41	11
4 Neistin	4	3	-	0	-	1	298	290	8	11
5 VB	4	1	-	0	-	3	354	366	-12	6
6 Tjaldur	5	0	-	0	-	5	268	434	-166	0

Stíf hevur tikið liðið úr kappingini

Støðan 1. deild menn

	dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1 VÍF	6	4	-	0	-	2	519	416	103	19
2 Neistin	5	5	-	0	-	0	505	427	78	19
3 StÍF	5	4	-	0	-	1	498	427	71	19
4 Kyndil	6	4	-	0	-	2	508	441	67	15
5 KÍF	6	2	-	0	-	4	401	518	-117	5
6 H71	6	1	-	0	-	5	428	508	-80	4
7 Tjaldur	6	0	-	0	-	6	438	560	-122	3

Viðmerking:

So gott og so trygt...

Sambært fjølmiðlunum hevur Sosialráðgevarafelag Føroya nú alment úttalað seg um avleiðingarnar av broyttu pensjónslógini, og soleiðis hevur almenningurin fingið váttað frá teim serkønu á økinum, t.v.s. teimum, sum skulu umsita lógina hvønn dag, at lógaruppskotið var ov illa umhugsað.

Tað eigur ikki at siga okkum so lítið.

Nógvar søgur

Vit sum hava roynt at fylgt við, og sum minnast nøkur ár aftur í tíðina, hava ikki gloymt hvussu søgurnar longu byrjaðu at ganga í áttatiárunum um misbrúk av sosiala verkinum, oyðsl av almennum peningi, og um yvirmannaða og alt ov kostnaðarmikla Almannastovu. Søgurnar eru ikki deyðar enn! Ávísir politikarar hava heldur ikki spart uppá atfinningarnar.

Men nú skuldi alt so broytast, og vit skuldu fáa nýggjar føroyskar lógir.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at henda viðmerking er ikki skrivað sum verjurøða fyri starvsfólkið á Almannastovuna. Viðmerkingin er meira ætlað til at vísa á, hvat er við at henda í okkara samfelag, og fyri at rópa eitt varskó — einaferð enn!!

Sosiala økið

Sosiala økið er breitt og umfatandi, tað umfatar alt samfelagið, og tað merkist í gerandisdegnum, uttan at øll kanska hugsa so nógv um tað. Og eitt er, sum skal sláast fast: **sosiala økið er kostnaðarmikið í krónum og oyrum her og nú.** Men vilja vit hava eitt vælferðarsamfelag, og tað vilja vit, so mugu vit øll vera við til at gjalda tað, sum tað kostar. Vit spara tað aftur aðrastaðir, sum tíðin gongur, men sjálvandi skal skil vera í tí vit gera.

Brúkt nógva tíð og orku

Nógv tíð og orka er brúkt til at svara spurningum frá fólki, síðan pensjónslógin varð broytt, sigur fakfelagið hjá sosialrágevarunum, og heldur ikki hava sosialráðgevarar greitt vitað, hvussu tey skulu umsita lógina, tí broytingar hava verið nógvar.

Hetta kunnu vit sum politikarar ikki bjóða okkara borgarum, samstundis sum vit reypa av, at yvirskotið í landskassanum er stórt.

Sum eitt dømi kann nevnast Sjúkrahúsverk Føroya, sum er illa fyri, hóast ein partur fekk størri játtan á fíggjarlógini enn ætlanin frá landsstýrinum upprunaliga var. Størsta sjúkrahúsið, Landssjúkrahúsið, var rættiliga við skerdan lut í mun til tørvin. Men, nú skuldu pensionistarnir fáa tað nógv betri, segði landsstýriskvinnan. Alt skuldi nú gerast so gott og trygt, rættvíst og einfalt at umsita, so sjúkrahúsverkið mátti bíða. Ta søguna kenna vit so nú!

Gongdin

Tí verður her ávarað, enn einaferð, um gongdina undir hesum landsstýrinum.

Nú fara politikarar úr teim trimum landsstýrisflokkum til Danmarkar um heilt stutta tíð at gera sáttmála um, at vit megna sjálvi, nú taka vit ábyrgd! Gamaní, vit skulu hava skiftistíð (siga somu flokkar!!), men sáttmálin skal gera greitt, at vit verða leys frá Danmark. So loysa vit trupulleikarnar við tíðini, og hægsta prísin fara so okkara børn og barnabørn at gjalda, men hva tá? Um Annfinn Kallsberg, Óli Breckmann, Heine O. Heinesen og møguliga Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal tá eru farin burtur úr politikki, vita vit ikki, men tá verða tey helst leys av øllum. Tey fara ivaleyst at klára seg, men hini í pensiónsaldri, hvat við teimum?? Tá verður nakað seint at skylda uppá danir, men helst fer tað at verða so.

Hetta er vert at hugsa um, og hetta **skulu** vit hugsa um, **áðrenn tey fara til Danmarkar at taka avgerðina fyri okkum**, tí tá samráðingarnar eru lidnar, tá er longu ov seint, tá er avgerðin tikin. Tá fólkaatkvøðan verður, verður onki at velja í, tá verður bert eitt uppskot!

Tórshavn 11-02-2000
Lisbeth L. Petersen,
Sambandsflokkurin

Martyrleiklutur fiskimanna

Tað kann ikki vera rætt, at sjómenn skulu noyðast at halda lív í øllum hesum nullunum sum t.d. starvast í bankum, matvøruhandlum, sjúkrahúsum, skúlum, bilverkstøðum, byggifyritøkum, skipasmiðjum, bókasøvnum, tollstovu, búskaparráðnum, politistøðum, timburhandlum, landstýri, løgtingi, cand. dittum og cand. dattum. Biði heldur allar hesar ónytturnar pilla av landinum so kunnu sjómenninir einsamallir syrgja fyri at skapa eitt rættvíst og rímuligt samfelag har ongin nassar upp á nakran. Hvussu teir so skulu útvega sær skip og fiskiamboð, selja fisk og orðna lønarútgjalding o.m.a., tað hugsa vit minni um.

Tað er nógv fyri, at ein skal føla seg noyddan at taka so til. Nú hevur í seinastuni verið nógv róp og brøla eftir teimum lærdu fólkunum í Føroyum sum, samsvarandi meiningini hjá einum breiðum skara av føroyingum, og landstýrisfólki við, bert eru nakrir forkelaðir apukattar sum hvørki gera eitt ella annað til nyttu afturímóti teimum hetjunum sum, í órættvísi, stríðast og strevast í tí, ið mest kann sammetast við eitt helviti, nevniliga á sjónum. Tað mátti verið mannminkandi, at verði mettur so ússaligur og vánaligur, at mann hevur uppibori sersømdir, rós, herðaklapp og serligt forstáilsi sum tað vísir seg at hesin neyðars fiskimaðurin í heilum hevur brúk fyri at hoyra frá landkrabbunum, men spurningurin er, um fiskimaðurin yvirhøvur hevur biði um hendan martyrleiklut ella hann nevniliga er skaptur av landkrabbunum.

Tað kann ikki bera til, at nakar skal føla seg noyddan at vera fiskimaður, um so er at viðkomandi ikki hevur hug til tess. Lat tað vera okkara vón, at sjómanslívið, eins væl og aðrir vinnuvegir, er eitt frítt væl hjá teimum sum her starvast og um hesir ikki ynskja at virka innan hesa vinnu, so have teir akkurát sama møguleika sum limirnir í búskaparráðnum og starvsfólkini á Hotel Vágum at velja okkurt annað at takast við. Tað man neyvan vera nakað slag av arbeiði sum altíð er stuttligt, og sjómaðurin man eins og sjúkrasystirin hava sínar góðu dagar og sínar minni góðu dagar.

Ella er tað kanska so, at tað slet ikki er sjómaðurin ið rópar so nógv upp, men harafturímóti nakrir pseudo-vinnulívsmenn (óveruligir vinnulívsmenn) sum ikki tola at hoyra, at teir nú skulu gerast rættir vinnulívsmenn og tillaga seg vanligar marknaðartreytir eins og vinnulívsmenn í øðrum liberalistiskum londum — nevniliga fría kapping?

Hava Føroyar brúk fyri væl lærdum fólki?

Tann 11. februar 2000 stendur ein grein í Sosialinum eftir Jóhan Mortensen (hereftir stytt J.M.). Tann greinin kemur í kjalarvørrinum á einum sera buldrutum og óciviliseraðum kjaki í seinastuni og einum fimmara í útvarpinum. Undirritaði fer at loyva sær at koma við tveimum endurgevingum úr hesi grein sum skurraði sera illa í oyrunum hjá undirritaða - " *Vit eru øll eins fyri Guði, men tó er munur á monnum. Ein fiskimaður er meira verdur fyri føroyska samfelagið enn vit skrivstovukalar í Havn__.Tað er ein sannroynd, at tað er fiskimaðurin á Munkagrunninum og flakakvinnan á Kósini, sum skapa tey sonnu virðini í hesum landi og sum vit øll onnur njóta gott av* " — endurgeving endar.

Tað er lítið at ivast í, at J.M. hevur skriva omanfyri nevndu grein í bestu meining, og hetta skal avgjørt ikki metast sum nakað persónligt álop á J.M., men ikki kann sigast at greinin byggir á breiðan seriøsitet.

Tá J.M. seinni í greinini kemur inn á hvussu soltin kvinnurnar leiklutur í føroyskum vinnulívi er, og setir spurningin, um tað er orsaka av at menn eru ov kvinnukúgandi, ja, so kann undirritaði væl fylgja við og fyri ein stóran part taka undir, men tá tað so seinni í greinini verður sagt (endurgeving byrjar) - " *Tað er sjálvandi meira áhugavert og ómakaleyst at fáa sær eitt akademiskt heiti og ein fulltrúasess við góðari eftirløn, og hvør kann brigsla einum ungum at hann vil virka undir tryggum korum ?* " — (endurgeving endar), ja, so eru vit enn einaferð vitni til ein alt ov vanligan og fulkomiliga skeivan hugsunarhátt hjá einum alt ov stórum parti av føroyingum.

Altso, tað ljóðar sum um, at tað at gerast lærdur í dag bert er at keypa sær ein ferðaseðil til útlandið og so møta upp onkunstaðni, stilla seg í biðirað og fáa sær eitt akademiskt heiti á einum kontórið, yvir ein keypmansdisk, ella okkurt sovorið. Tað er so pilkandi lætt og ómaksleyst at tað kann ein og hvør idiotur gera uttan stórvegis hóvasták.

Ja, tað er ikki so løgi at fleiri herheima meta ein slíkan 'cand. dit ella cand. dat' sum ein landasvíkjara, eitt huldufólk sum hevur ligið skít í og bólta í nøkur ár á flatlondum, og sum 'aldrin hevur gjørt nakað ORDULIGT til nyttu'.

Hetta prógvar, at tað er okkurt spinnandi gali við tilvitskuni her á klettunum.

Mín uppfatan er, at tað eru alt ov fá 'cand. dit' og 'cand. dat' í Føroyum, og tískil eru Føroyar eitt alt ov einspora samfelag við bert einari høvuðsvinnu.

Tað er stórur tørvur á væl lærdum fólki, ikki minnst í føroyskum vinnulívi, og høvdu tað verið fleiri fólk við høgari útbúgving í Føroyum, og hesi fingu eins góðar sømdir sum væl lærd fólk aðrastaðni, so hevði føroyskt vinnulív heilt avgjørt verið nógv meiri fjøltátta enn tað er í dag. Á sama hátt er brúk fyri einum búskaparráði sum kann koma við góðum fakligum vegleiðingum til politikkarar og embætisfólk.

Hava væl lærd fólk brúk fyri Føroyum?

Hesin spurningur hevur eisini verið havdur á lofti fyrr. Sannleikin er, at í heimsins mest framkomnum londum verður lærdómur mettur sera høgt. Tað er ein spurningur um at klára at fylgja við útviklinginum, hava "know how" og duga at brúka tøkni bæði innan vinnulív og almenna fyrisiting. Best er sjálvandi, um mann er førur fyri at verða slóbrótari innan summi økir. Í Føroyum hevði tað verið heilt nattúrligt at satsa upp á at vit kundu verði slóðbrótarar innan fiskivinnu og tilvirkan av ymsum fiskaúrdráttum, og kanska innan skipasmið við. Men tað er so sanniliga eisini týdningarmikið at hava ein vælvirkandi almennan sektor, og alt hetta krevur vælútbúgvi fólk.

Og víst og satt er tað, at um útbúgving og lærdómur ikki fær høga raðfesting í samfelagnum og verður virt, so kann mann gott gloyma alt um at verða kappingarførur og varveita eins høgt livistøði sum í øðrum framkomnum londum. Kappingin millum londini er hørð, og tann sum fremstur er innan granskning og vitan kemur at draga tey longstu stráðini. Soleiðis eru treytirnar nú einaferð. Og tað er galdandi fyri øll samfelagsøkir tað verið seg innan fiskivinnu, skipasmið, heilsurøkt eins væl og innan almenna umsiting.

Tað er stórur eftirspurningur eftir vælútbúnum fólki allastaðni í verðini, jú dugnaligari ein er, jú betri eru møguleikarnir at fáa góð størv við góðum lønum. Framkomin lond vilja fegin gjalda fyri at fáa fatur á dugnaligum fólkið við góðum lærdómi, tí hesi koma at kasta mangt slíkt av sær aftur til samfelagið táið av tornar.

Tað sum eykennir menningar-lond og bananrepublikkir er nevniliga hetta, at ein stórur partur av fólkinum í hesum londum hava ongan lærdóm. Tey eru í einari støðu har koruptión og óskil valdar í landinum orsaka av vantandi útbúnum fólki og ordiligum viðurskiftum. Er tað kanska tann vegin mann ynskir at ganga í Føroyum? So sig tað bara - tí tey vælútbúnu skulu nokk klára seg, og finna sær vinnuvegir aðrastaðni enn í Føroyum.

So tað er ikki bara ein spurningur um Føroyar hava brúk fyri vælútbúnum fólki, men minnst líka nógv, um væl útbúgvin fólk hava brúk fyri Føroyum.

Jarðfrøðilesandi
Hilmar Simonsen